# Fjarðastevnan er eitt stórt felags

**– Kanska halda fólk, at stevnurnar eru vorðnar ov triviellar og keðiligar, men vit gera, hvat vit kunnu fyri at seta eina fjølbroytta, áhugaverda og forvitnisliga skrá á kjøl, sigur forkvinnan í VÍF, Jóngerð Nielsen**



VESTMANNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er Vestmanna Ítróttarfelag (VÍF), ið stendur aftanfyri fjarðastevnuna, sum í vikuskiftinum verður hildin í Vestmanna.

Í starvsnevnd felagsins sita tríggjar kvinnur, sum eru Jóngerð Nielsen, forkvinna, Una Johansen, peningarøkil og Jórun Olsen, sum er skrivari.

Undir sær hevur felagið hondbóltsnevnd, róðrarnevnd, badmintonnevnd, bátastevnunevnd og stuðulsnevnd.

### Stórt tiltak

Jóngerð Nielsen sigur, at fjarðastevnan, sum verður hildin í Vestmanna annað hvørt ár, er eitt stórt tiltak, og tað eru nógv fólk tilsamans, sum viðvirka til, at stevnan kann fara av bakkastokki.

Tað er eisini VÍF, sum stendur aftanfyri árliga bátafestivalin í Vestmanna, og eisini her er tað Jóngerð, sum saman við øðrum stendur við endan.

– Tað er stórur munur á at fyrireika og samskipa fjarðastevnu, sum byrjar longu hóskvøldið og so bátafestivalin, ið bara varar tann eina dagin.

Hon vísir á, at neyðugt er hjá teimum at fara tíðliga í gongd við alt, sum skal leigast til stevnuna, eitt nú tivoli og hoppiborgir, og eisini er neyðugt at finna sær tónleikabólkin í góðari tíð, sum skal spæla til dansin leygarkvøld.

– Neyðugt er eisini í hampiliga góðari tíð at finna fram til, hvørji tiltøk kunnu hugsast at verða á stevnuni, og síðan skulu hesi savnast í eini felags skrá fyri stevnudagarnar. Tey meira praktisku viðurskiftini koma vanliga upp á pláss í vikunum fyri stevnuna og í døgunum uppundir.

Forkvinnan sigur, at starvsnevnd, undirnevndir og onnur feløg í bygdini, sum eru við og hava tiltøk á eini slíkari stevnu, eru saman á fundum, sum síðan enda við, at ein felags skrá verður løgd.

– Tað ræður jú um at hava okkurt til øll, bæði til børn, tilkomin og eisini til tey eldru. Tað ræður eisini um at hava okkurt, sum ikki er so vanligt á øðrum stevnum. Men hetta er ikki so lætt, tí skráirnar kring um á stevnunum eru so stórar og fjølbroyttar. Tí er torført at finna tiltøk, sum hini ikki hava, og sum kunnu draga fólk á stevnu.

### Hæddarpunktið

Forkvinnan í VÍF vísir á, at hæddarpunktið á fjarðastevnu er kappróðurin, sum telir við í

# Áhugaverd tiltøk á fjarðastevnu

**Eitt av stuttligu tiltøkunum á fjarðastevnu verður ein skemtidystur í fótbólti millum bygdaráðini í Vestmanna og Kvívík**

VESTMANNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fjarðastevna verður sett leygardagin klokkan 14, og tað verður borgarstjórin í Vestmanna, Karl A. Olsen, sum setir stevnuna á torginum í bygdini.

Sjálv stevnuskráin er prentað í Sosialinum í dag, og tí fara vit ikki at gera so nógv burtur úr teimum mongu tiltøkunum, sum eru í skránni.

Forkvinnan í VÍF, Jóngerð Nielsen, sigur, at eitt av tiltøkunum, sum altíð plagar at savna nógv fólk og eydnast væl í Vestmanna, er dansurin í Ítróttarhøllini.

– Spaðar 5, sum er vælumtóktur bólkur til dansitónleik, fara at spæla, og vit ivast onga løtu í, at nógv bygdafólk, stevnugestir og fólk annars fara at leita sær í høllina leygarkvøldið.

Av øðrum forvitnisligum tiltøkum á fjarðastevnu, nevnir Jóngerð meksikanksu uppboðsøluna, sum verður leygarkvøldið. Talan verður um uppboðssølu av list, sum sonevndir lokalir amatørar hava málað, eitt nú Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, Karl A. Olsen, borgarstjóri og Martin Joensen, tónlistamaður.

– Eisini verður søla av eini skemtitekning av bygdaráðnum í Vestmanna, leggur hon aftrat.

Eitt annað tiltak, sum forkvinnan hevur hug at nevna úr rúgvuni, er steypadystur leygardagin millum 1. manslið hjá VÍF og Neistanum.

– Sunnudagin verður eisini ein skemtidystur í fótbólti millum bygdaráðini í Vestmanna og Kvívík. Hesin verður á gamla vøllinum omanfyri skúlan. Eftir fótbóltsdystin verður hondbóltsdystur fyri veteranar, sum seinast í sjeytiog fyrst í áttatiárunum mannaðu bestu liðini hjá VÍF og Kyndli.

Nakrir av teimum, sum fara á vøllin sunnudagin, vóru hesi árini eisini við til at manna føroyska hondbóltslandsliðið.

Jóngerð Nielsen nevnir eisini barnatiltakið sunnukvøldið klokkan 19, har gyklarin og búktalarin, Ásbjørn Berthelsen, fer at undirhalda.

– Fríggjakvøldið verður konsert í Staðnum, sum er ungdómshúsið í Vestmanna, og her fara Jens Marni Hansen og nýggi bólkurin Píggj í Vestmanna at spæla og undirhalda. Bryggjan, sum eisini verður rópt barrin í Vestmanna, fer sjálvandi eisini at hava opið stevnudagarnar, og her verður "live" konsert um fríggjakvøldið og leygarkvøldið við Eyðuni og Neil, sigur forkvinnan í VÍF.



*Konsert verður í ungdómshúsinum Staðnum fríggjakvøldið klokkan 20 við Jens Marna Hansen og vestmannabólkinum*

*Mynd: Birgir Waag Høgnesen*